Nú má ferðin tálmast

Stjórin á Føroya Fiskavirking heldur, at vit eiga at ansa eftir ikki at økja ferðina á búskapinum. Tað gongur nóg skjótt í løtuni, heldur hann

VINNULÍV
Edvard Joensen

Vit eiga at dríggja virksemið í landinum nakað, heldur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking. Hann sigur, at vit eiga at ansa væl eftir, um tað er skilagott at fara undir alt ov nógv nýtt virksemið samstundis.

Tað er við greiðari ábending til oljuvinnuna, at stjórin á Føroya Fiskavirking mælir til at hava bæði beinini á jørðini. Hann heldur, at tað kann standast ein ávísur vandi av, at øll eru so spent upp á eina komandi oljuvinnu, sum vit enn ikki kenna nakað til.

Tað verða longu nú fleiri fyritøkur stovnaðar, sum hava til endamáls at veita ymsar tænastur í samband við oljuvinnuna. Men enn vita vit als ikki, um tað yvirhøvur verður nøkur olja at vinna.

–Men vit uppliva longu nú, at tann vinnan er farin at taka fólk frá eitt nú fiskivinnuni, sigur Meinhard Jacobsen. Úrslitið kann í ringasta føri gerast, at tað fer at mangla arbeiðsmegi í fiskivinnuni. So er neyðugt at fáa fólk aðrastaðni frá til Føroya at arbeiða.

Eins og oljupengarnir, sum øll tosa so nógv um í dag, hitar tað eisini búskapin, um tað koma kanska fleiri hundrað fremmandafólk til Føroya at arbeiða.

Nú eiga vit at slakka eitt sindur av og taka bestikk at støðuni, heldur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking. Tað gongur nóg skjótt við búskapinum, og vit eiga at tryggja okkum, at tað, vit fara undir, er skilagott

Savnsmynd

Nevnt hevur verið onkunstaðni, at kanska eini 500 fremmandafólk fara at koma hendanveg til arbeiðis.

–Tað er øgiliga nógv, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking. Prosenttalið verður rættiliga høgt, um so verður.

Meinhard Jacobsen sær í ávísan mun áttatiárini aftur í tí, sum hendir nú. Og hann ávarar í móti at vit koma í ta støðuna, sum alt virksemið tá endaði við.

—Sjálvandi eiga vit at vera so mikið at okkum komin, at vit ikki aftur koma í ta støðuna, vit vóru í í 1992. Men hví vit skulu halda, at vit hesaferð skulu klára at stýra gongdini, um hon verður tann sama sum tá, dugi eg ikki at síggja. Vit eru somu persónarnir, sum vit vóru tá. Og hóast vit halda okkum hava fingið einahvørja opinbering, er tað ikki vist, at vit eru so øgiliga feilfrí fyri tað, ávarar stjórin á Føroya Fiskavirking.

Hann metir seg ikki vera svartskygdan kortini. Bert eitt sindur realistiskan.

Eitt nú vísir hann á, at øll hesi størvini, sum lýst verða leys um dagarnar, skulu eisini setast. Serliga eru tað størv í ymsum tænastuvinnum, sum nú draga at sær. Fólkið verður so tikið úr aðrari vinnu. Tað ger so aftur, at tað verða størv sett við fólki, sum ikki eru fakfólk.

–Úrslitið verður bara tað, at samlaða veitingin versnar, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

Gulllaksur í Miðvági

Føroya Fiskavirking hevur sett eina nýggja gullaksalinju upp á virkinum í Miðvági. Tað fer at geva støðugari arbeiði á virkinum um summarið

FISKIVINNA
Edvard Joensen

Ein nýggj gulllaksalinja er sett upp á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági. Hon fer at skapa støðugari arbeiði á virkinum, sigur stjórin

Mynd: Edvard Joensen

Ein nýggja gulllaksalinja er sett upp á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági. Linjan verður nú royndarkoyrd.

Fyri umleið fjúrtan døgum síðan varð ein gulllaksalingja sett upp í Miðvági. Talan er um eina íløgu upp á eina góða milión ella so, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen.

Aðrastaðni í blaðnum í dag mælir hann til varsemi í vinnuni. Men hann heldur kortini ikki, at hendan íløgan kann bíða.

–Høvuðsgrundin til, at vit gera hesa íløguna er, at vit vilja fáa støðugari arbeiði á virkinum. Við hesum kunnu vit bjóða fólki arbeiði hvønn dag, og tað má væl vera tað, sum telur, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking.

Hann greiðir frá, at virkið í Miðvági í stóran mun hevur arbeitt hýsu. Veturin er hýsutíð, og um summarið hevur so verið heldur lakari.

Men gulllaksurin er summarfiskur, so nú ein gulllaksalinja er sett upp, fer tað at geva støðugari arbeiði á virkinum, sigur stjórin.

Tað eru fýra trolarar, tvey pør, sum fiska gulllaks undir Føroyum. Teir eru Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, umframt Stjørnuna og Polarhav. Fiskurin verður keyptur á uppboðssølu í almennari kapping, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann ber ikki ótta fyri, at tað verður ov nógv roynd eftir gulllaksinum, hóast eitt virki aftrat fer at arbeiða hendan fiskin. So mikið er til, sigur hann, at tað fer at bera hesa framleiðsluna.

Ein onnur grund til, at Føroya Fiskavirking nú fer undir hesa framleiðsluna er, at Føroya Fiskavirking hevur fingið rætitliga nógvar fyrispurningar frá útlendskum keyparum, sum vilja hava gulllaks.

–Sjálvandi vita vit ikki, um hesin áhugin eisini verður komandi ár, men vit gera so íløguna fyri at nøkta verandi tørv, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

Summartíðin er ring tíð til arbeiðsmegi. Fólk vilja, sum vera man, hava summarfrí. Men tað fer ikki at verða nakar trupulleiki hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági, sigur Meinhard Jacobsen.

Í fyrsta lagi krevur hendan gulllaksalinjan ikki serliga nógv fólk. Og í øðrum lagi er avtalað við arbeiðsfólkið á virkinum at tey skiftast um at halda summarfrí, so virkið kann koyra alla tíðina.

Annars sigur stjórin á Føroya Fiskavirking, at tey av og á merkja, at tað er í minna lagi av arbeiðmegi at fáa. Tá er tað, at hugsað verður um, hvørt tað er rætt at innflyta arbeiðsfólk ella ikki.

Hann er ikki serliga áhugaður í at fáa ov nógva fremmanda arbeiðsmegi hendanveg. Vit eiga at klára okkum við okkara egna fólki, heldur hann.

Ikki tað, at hann hevur nakað í móti fremmandari arbeiðsmegi. Men hann metir bara ikki, at vit hava umstøður til at hýsa teimum.

Tey krevja eins og øll onnur tak yvir høvdið og annars allar teir hentleikar og tilboð, sum øll onnur í samfelagnum hava. Og tað gongur nógvastðani upp sum er at hýsa teimum, sum frammanundan búgva í landinum.

–Tað fellur kanska onkrum fyri brósti, at tað verður sagt soleiðis. Men veruleikin er, at vit noyðast at fyrihalda okkum til støðuna, sum hon er, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

Eidesgaard um tingfund sunnudag:

Old má sjálvur taka ábyrgd

Formaður Javnaðarfloksins heldur tað ikki vera rætt at nokta at møta, tá tingið verður sett sunnudagin, ólavsøkudag. Men hann ætlar sær ikki at átala Hendrik Old fyri ikki at møta, av tí, at talan er um eina persónliga og ópolitiska avgerð

TINGFUNDUR
John Johannessen

Jóannes Eidesgaard er ikki samdur við avgerðini hjá Hendriki Old, um ikki at møta, tá tingið verður sett á ólavsøku. Men hann ætlar ikki at átala Hendrik Old fyri avgerðinq

– Hendrik Old hevur tikið eina persónliga avgerð, sum hann sjálvur má taka ábyrgd av. Hann er fólkavaldur tingmaður, og eg havi ikki mandat at revsa hann fyri ikki at møta.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðafloksins, til avgerðina hjá Hendriki Old um at sýta fyri at møta, tá tingið verður sett á ólavsøku, av tí, at setanin í ár fellur á ein sunnudag.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at Hendrik Old hevur tikið avgerð í einum máli, sum ikki kann metast sum eitt politiskt mál. Og tí kann ikki sigast, at hann stríðir móti tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum.

Men í viðtali við Sosialin leygardagin royndi Hendrik Old at gera avgerðina politiska. Hann segði tá soleiðis við Sosialin:

»Fyri meg er hetta málið ikki ein átrúnaðarligur spurningur. Hetta er ein spurningur, um tingið skal virða, at sunnudagurin er frídagurin hjá øllum. Gongdin í samfelagnum í dag er, at sunnudagurin meira og meira verður gerandisdagur, so tímalønt fólk eru noydd at arbeiða sjey dagar um vikuna. Og eg haldi, at tingið má ganga undan at vísa, at sunnudagurin er frídagur. Serliga nú, vit fara inn í oljuvinnuna.«

Hetta hevur Jóannes Eidesgaard ikki stórvegis viðmerkingar til. Hann sigur bert, at tað er lógarfest í stýrisskipanarlógini, at tingið skal setast á ólavsøku, sjálvt um hetta fellur á ein sunnudag. Og tí heldur hann, at tingmenn skuldu havt gjørt vart við seg fyri seks árum síðani, tá lógin varð samtykt.

– Eg eri ikki persónliga samdur við Hendriki í hesum máli. Eg fari sjálvur at møta til tingfundin, og tað rokni eg eisini við, at restin av tingmanningini, burtursæð frá Hendriki Old, fer at gera, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins staðfestir, at samstarvið í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum er gott, og at avgerðin hjá Hedriki Old ikki fer at broyta upp á hetta.

– Hendrik hevur tikið eina persónliga avgerð, ið ikki er politisk, og tað skal hann hava loyvi til, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hans Eiler prædikar á ólavsøku

Tað verður Hans Eiler Hammer, prestur í Klakksvík, sum í ár fer at halda ólavsøkuprædikuna.

Hans Eiler Hammer er kendur fyri sínar avgjørdu meiningar um hvat er rætt og hvat er skeivt í samfelagnum. Tí kunnu vit helst vænta eina eitt sindur »hvassari« ólavsøkuprædiku í ár, enn teirri frá Meinhardi Bjartalíð í fjør.

Tingfundur sunnudag:

Eidesgaard hevur ábyrgdina av Old

Tingforðmaðurin hevur í tingskipanini ongan møguleika at átala Hendrik Old fyri, at hann sýtir at møta til tingfundin sunnudagin á ólavsøku, eins og hann hevur skyldu til. Men Jóannes Eidesgaard hevur, sum formaður í Javnaðarflokkinum, ábyrgd fyri, at Hendrik Old røkir sýtt starv

TINGFUNDUR
John Johannessen

Finnbogi Ísakson, tingformaður, hevur ongan møguleika at átala Hendrik Old, fyri at hann sýtir at møta til tingfund

At Hendrik Old, tingmaður, sýtir fyri at møta, tá tingið verður sett á ólavsøku, kann gerast ein trupulleiki hjá Jóannes Eidesgaard.

Hendrik Old brýtur tingskipanina við ikki at møta til tingfundin á ólavsøku, eins og hann hevur fingið boð um. Men kortini hevur tingformaðurin ongan sanktiónsmøguleika móti honum.

– Eg havi bert sanktiónsmøguleikar móti tingmonnum, sum eru á fundi. Tað vil siga, at eg kann taka orðið frá tingmonnum, ið bera seg óhóviskt at í tinginum. Men møta teir ikki á fundi, kann eg einki gera. Tá er tað ein spurningur millum einstaka tingmannin og veljarar hansara, sigur Finnbogi Ísakson, tingformaður.

Men samstudis vísir Finnbogi Ísakson á, at um vit hyggja at mannagongdunum í grannalondunum, hevur formaðurin fyri flokkin ábyrgdina av, at tingmaður sýtir fyri at møta.

Finnbogi Ísakson heldur, at Hendrik Old bæði brýtur stýrisskipanina og tingskipanina, tá hann sýtir fyri at møta á tingfundi ólavsøkudag Eftir hansara fatan brýtur Hendrik Old stýrisskipanina, tá hann sýtir fyri at møta til ein tingfund, sum er ásettur við lóg í stýrisskipanini. Og harafturat brýtur Hendrik Old tingaskipanina við at vera ólýðin boðunum frá tingformanninum.

– Eg havi sent út fundarboðini um fundin ólavsøkudag, og í innkallanini sigi eg, at eg vil hava at vita frá tingmonnum, um teir ikki kunnu møta. Eg havi einki hoyrt enn frá Hendriki Old, men eg vænti at fáa formlig boð frá honum, sigur Finnbogi Ísakson.

Finnbogi Ísakson heldur tað annars vera keðiligt, at spurningurin, hvørt tað er rætt ella skeivt at seta tingið sunnudag á ólavsøku tekur seg upp nú, tá spurningurin varð avgreiddur í tinginum fyri sjey árum síðani.